# Borgarstjórin má frá sum ÍSF-forseti

**Heðin Mortensen kann ikki halda fram sum forseti í Ítróttarsambandi Føroya og í øðrum líknandi álitissessum. Kommunulógin forðar fyri, at ein borgarstjóri kann hava slík størv**

BORGARSTJÓRI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Heðin Mortensen er kendur sum ein sera virkin maður. Hann hevur verið við í nógvum nevndum, og hann hevur havt fleiri áitisstørv samstundis.

Men nú hann skal verða borgarstjóri í Havn, verður hann noyddur at leggja borgarliga starvið og onnur álitisstørv frá sær.

Og tað merkir millum annað, at Ítróttarsamband Føroya skal hava nýggjan forseta fyri Heðin Mortensen, sum hevur sitið í sessinum í 24 ár.

– Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann leggja borgarliga starvið frá sær umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við starvið sum borgarstjóri, sigur Kommunustýrislógin frá 2000.

### Eingin ivi í lógini

At ein borgarstjóri má leggja øll onnur størv frá sær, tá ið hann verður valdur, er galdandi fyri tær kommunur, har borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv, og tað hevur tað verið í Havn í nógv ár. Býráðið kann geva undantøk frá regluni, men tað er bert, tá ið tað umræður beinleiðis fólkavald størv – og her verður serliga hugsað um løgtingsmenn.

– Lógin sigur, at ein fulltíðar borgarstjóri skal vera borgarstjóri fult og heilt, og hann skal leggja sítt borgarliga starv og onnur álitisstørv, sum ikki hava beinleiðis samband við borgarstjórastarvið, frá sær, sigur Hilmar Høgenni, deildarleiðari í Innlendismáláráðnum.

Hann vil ikki gera eina meting av tí ítøkiliga døminum, men sigur, at tað er ikki avgerandi, at uppgávan í einum frítíðarfelag er ólønt, men heldur, at hon einki hevur við borgarstjórastarvið at gera.

Og verður hetta ført yvir á ítøkiliga dømi í Havn, so má niðurstøðan vera, at borgarstjórin í Havn ikki verða ÍSF-forseti.

### Heðin var afturvaldur í ár

Síðani 1980 hevur Heðin Mortensen verið forseti fyri føroyskan ítrótt. Hann hevur verið í sessinum longri enn nakar annar frammanundan hann, og á aðalfundinum fyrr í ár varð hann afturvaldur fyri næstu tvey árini.

Starvsnevndin í ÍSF er mannað við Heðini Mortensen, sum er forseti, Sverre Midjord er varaforseti, og Petur Elias Petersen er skrivari. Harafturat er John Kjær varalimur.

Næsti aðalfundur hjá ÍSF verður í mai mánaði næsta ár, og tá standa bæði Sverre Midjord og Petur Elias Petersen fyri afturvali.

Sannlíkt er tí, at John Kjær nú kemur í starvsnevndina fyri Heðin Mortensen, og Sverre Midjord røkir uppgávuna sum forseti fram til aðalfundin næsta ár.

Tá kunnu ítróttarfeløgini í Føroyum síðani velja sær nýggjan forseta og starvsnevnd.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerking frá Heðini Mortensen um hetta málið fyrrapartin fríggjadagin.

# Schumann tikið seg úr Sambandsflokkinum

**1. januar eitur eingin limur í Sambandsflokkinum Schumann Hjaltalin. Fyrrverandi býráðspolitikarin hevur tikið seg úr flokkinum av persónligum áðum**

FLOKSSTRÍÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Eg er sambandsmaður og eg stuðli Sambandsflokkinum, men eg havi tikið meg úr flokkinum av persónligum áðum og hesum havi eg boðað flokkinum frá.

Schumann Hjaltalin hevur verið drúgvur stuðul hjá Sambandsflokkinum í Tórshavnar býráð, men kortini hevur hann valt at taka seg úr flokkinum 1. januar. Tað er ikki tvídráttурin í samband við samgongutelvingina í Tórshavnar býráð seinastu dagarnar, men hinvegin telvingin um landsstýrissamgonguna í januar mánaði millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, sum er orsøkin.

Fyrrverandi býráðslimur vil ikki greiða nærri frá, hvat ónøgdin snýr seg um, men váttar kortini, at 1. januar verður hann ikki limur í Sambandsflokkinum.

Schumann Hjaltalin leggur afturat, at hann bakkar leiðsluna upp í samband við stríðið, sum er íkomið í samband samgongusamráðingarnar, og hann metir tað er rætt av flokkinum at útihýsa Heðin Mortensen.

– Heðin hevur verið snildur, men mátin er ódámligur, er stutta viðmerkingin hjá Schumann Hjaltalin.



# Havnin fær nýtt stýrið

**Avtalan millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin hevur við sær, at borgarstjórin og varaborgarstjórin í Havn verða skiftir út á nýggjárinum, og nýggj fólk skulu verða formenn í nevndunum hjá Tórshavnar býráði**

MEIRILUTI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Øll leiðslan í Tórshavnar býráði verður skift út á nýggjárinum. Borgarstjórin og varaborgarstjóri verða nýggir, og tað sama er við øllum formonnunum í nevndunum hjá býráðnum.

Tað er greitt, nú avtalan millum Javnarflokkin og Tjóðveldisflokkin tykist verða staðfest. Hesir báðir flokkar hava 7 av 13 býráðslimum, eftir at Heðin Mortensen skifti part – úr Sambandsflokkinum og yvir í Javnaðarflokkin.

Og flokkarnir, sum fram um aðrar hevur myndað býráðspolitikkin í Havn seinastu fýra árini, verða setti fullkomiliga uttanfyri. Fólkaflokkurin, sum hevur havt borgarstjóran, skal manna minniluta saman við Sambandsflokkinun, sum er alt í einum er farin úr fýra býráðslimum og niður í tveir.

### Útskiftingin

Meirilutin hevur sett navn á formenninar í teimum ymsu nevndunum, og tað hevur verið sær, at alt verður skift út á nýggjárinum.

Heðin Mortensen loysir Jan Christiansen av sum borgarstjóra, og Jógvan Arge verður nýggjur varaborgarstjóri fyri Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen skal eisini loysa Jan Christiansen av sum formaður í Fíggjarnevndini, har borgarstjórin altíð er formaður.

Í Byggi og býarskipanarnevndini eitur nýggi formaðurin Jógvan Arge (E), og hann kemur fyri Heðin Mortensen (C).

Nývalda Marin Katrina Frýdal (E) skal verða forkvinna í Teknisku nevnd, og har hevur Sjúrður Olsen (A) verið formaður seinastu árini.

### Kvinnur á odda

Elin Lindenskov (C) loysir Tórfinn Smith (C) av sum forkvinna í Heilsu og Umhvørvisnevndini.

Hitt kvinnuliga javnaðarumboðið, Katrin Dahl Jakobsen, verður forkvinna í Sosialu nevnd, og har loysir hon eina aðra kvinnu, Beate L. Samuelsen (B), av. Ein kvinna skal eisini leiða Mentanarnevndin, og falið er fallið á Hildur Eyðunsdóttir (E). Hon kemur fyri Heði Mortensen (C).

Í Havnanevndini verður tað fyrrverandi borgarstjórin, Leivur Hansen (E), sum skal loysa Bjarta Mohr (A) av sum formaður.

Samanlagt hevur Tjóðveldisflokkurin fýra formenn og Javnaðarflokkurin tríggjar formenn í nevndunum í Tórshavnar býráði.

# – Vit líta á hvønn annan

**Katrin Dahl Jakobsen heldur ikki, at kaotisku samráðingarnar um nýggjan meiriluta í Havn, fara at forða fyri góðum samstarvi í meirilutanum**

BÝRÁÐSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Vit líta á hvønn annan og eru sera spent til at fara í gongd.

Soleiðis sigur Katrin Dahl Jacobsen úr Javnaðarflokkinum, eftir at tað nú tikist verða púra greitt, hvør meirilutin í Tórshavnar býráði verður næstu fýra árini.

Rok og kaos hevur valdað í Havn síðani valkvøldið, og fleiri avtalur eru gjørdar millum flokkarnar. Summar avtalur skuldu vera bindandi, aðrar skuldu váttast, og millum allar avtalurnar royndu politikarar langt innanfyri mark fyri at tryggja sær ávirkan og royna at leggja fót fyri hini.

### Tey líta á hvønn annan

Ber tað yvirhøvur til at hava ein gott samstarv í býráðnum eftir alt hetta?

– Ja, tað rokni eg við. Fólk eru spent, og stemningurin er sera góður, nú vit hava undirskrivað okkara avtalu, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

*Kunnu tit líta á hvønn annan eftir allar hesar avtalurnar?*

– Ja, vit líta á hvønn annan. Javnaðarflokkurin helt seg samráðast við Sambandsflokkin, tá ið fyrra avtalan var gjørd. Tit fingu at vita, at leiðslan í flokkinum visti av samráðingunum. Tá ið tað so vísti seg, at flokkurin ikki stóð aftanfyri avtaluna, høvdu vit ein trupulleika, tí vit gera ikki avtalur við persónar, men við flokkar.

*Var tað so ein góð loysn, at Heðin Mortensen kom upp í Javnaðarflokkin?*

– Javnaðarflokkurin er opin fyri øllum, og eg rokni ikki við, at nakar flokkur fer at siga nei til at fáa nógvar atkvøður. Allir flokkar vilja jú vaksa.

### Kabalin gekk upp

*Hví gjørdu tit eina avtalu við Fólkaflokkin, eftir at tit høvdu eina avtalu við Tjóðveldisflokkin og Heðin Mortensen?*

– Tá tað kom fram, at Sambandsflokkurin ikki stóð aftanfyri avtaluna við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin, tosaðu vit við Fólkaflokkin. Tað var Fólkaflokkurin, sum bæð okkum koma á fund, og tað fóru vit. Men avtalan við Fólkaflokkin var treytað av, at valfelagið góðtók hana.

Endin var tó, at valfelagið hjá Javnaðarflokkinum ikki vildi góðtaka samstarvið við Fólkaflokkin, og tá ið Heðin Mortensen so vildi sleppa upp í Javnaðarflokkin, gekk ein sera fløkt kabal mitt í tí heila upp.

Javnaðarflokkurin fekk ein býráðslim afturat, flokkurin fekk borgarstjóran, og so var lag á manni at skriva undir nýggja avtalu við Tjóðveldisflokkin.

### Kvinnurnar ráða

Sjey býráðslimir verða partur av meirilutanum í Tórshavnar býráði næstu fýra árini, og av teimum eru fýra kvinnur.

– Kvinnurnar hava góða umboðan í meirilutan, og eg ivist ikki í, at tað fer at vera við til at gera alt øðrvísi og betur næstu árini, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

– Tað verður nógv at fara í holt við eftir nýggjárið, og tað gleða vit okkum til. Eg ivist ikki í, at samstarvið í meirilutanum fer at vera gott.